## DAGSINS MEINING

# Leiðin til Suðuroyar

Í øldir hevur Suðuroy verið í serstøðu millum hinar oyggjarnar. Oyggin er fjarskotin og er sermerkt á mangan hátt, og er hetta sagt í jaligari merking. Búskaparliga, sosialt og mentanarliga hevur gjøgnum tíðirnar gingið upp og niður. Í slupptíðini var Suðuroy búskaparliga og mentanarliga í fremstu røð, meðan tað sosialt ikki stóð væl til. Tí kom verkamannarørslan fyrst til Suðuroyar og gjørdist henda rørsla so sterk í oynni, at hon eitt skifti átti størstu fyritøku í Føroyum. Oyggin er rík frá náttúrinnar hond. Her er kol, her eru góðir firðir við náttúruhavnum, góðar fiskileiðir, góðir skúlar, gott almanna- og heilsuverk við nýggjum sjúkrahúsi og eitt sera rakst og virkið fólk.

Tað er samfelagsins skylda at tryggja hesum fólki somu lívs- og virkismøguleikar, sum aðrir føroyingar hava. Ein meginfortreytin er góð samferðsluviðurskifti millum Suðuroy og meginøkið og eitt gott undirstøðukervi í oynni sjálvari. Tunnilin milum Hovs og Øravík, sum nú fer í gerð, er mikið framstig og fer at stytta leiðirnar og bøta um trygdina. Nýggi Smyril fer hartil at bøta heilt munandi um farleiðina millum Suðuroy og meginøkið. Tað verður heilt einfalt betri at vera umborð við tað at skipið er serbygt til endamálið. Farleiðin fer at styttast við hálvum tíma til trý korter og skipið er í allar mátar arbeiðsligari enn Smyril I. Hetta er ein sera góð íløgu, soleiðis, sum landið liggur í løtuni - ein íløga, sum kemur í evstu løtu. Nýggi Smyril er ein viðurkenning av tí serstøðu, sum Suðuroy geografiskt hevur og eitt tiltak, sum allir føroyingar saman við suðringum eiga at fegnast um. Vit ynskja suðringum og øllum føroyingum hjartaliga tillukku við nýggja og stásiliga skipinum.

Samstundis sum øll fegnast og gleðast yvir hetta risastóra framstig fyri suðringar og fyri allar føroyingar, eiga avvarandi myndugleikar og stovnar, land og kommunur beinanvegin at fara undir at leita eftir tí ferðasambandi millum Suðuroy og meginøkið, sum er mest hóskiligt fyri eina framtíð, sum ikki er so langt burturi. Nýggja stásiliga farið loysir uttan iva tann mest átrokandi tørvin her, nú og nøkur ár fram. Annað alternativ er ikki í løtuni, og haldast kundi ikki fram við tí skipi, sum nú eitur Smyril 1. Sostatt er nýggi Smyril ein røtt, sera góð og ábyrgdarfull almenn íløga. Men, sum frá líður, eiga onnur alternativ at verða kannað og eigur at verða farið undir hesar kanningar beinanvegin. Við hesum ynskja vit nýggja farinum vælkomnum til landið og ynskja, at tað má verða suðringum og øllum føroyingum til gleði og gagn.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Sambandið úteftir er ein mannarættur

**– og avbyrging er ágangur móti persónliga frælsinum. Opið bræv til landsstýrismannin í fíggjarmálum, Bárður Nielsen og Starvsmannafelagið**



**Hergeir Nielsen**
*løgtingsmaður*

Kreppustøðan á almenna arbeiðsmarknaðinum hevði beinanvegin við sær, at vit í Suðuroynni vórðu avbyrgd frá restini av heiminum, og hesi vanlukku orka vit ikki at standa ímóti.

Hetta er ein sera álvarsom støða fyri okkum, ið her búgva, og heitt verður tí inniliga á tykkum um at ansað eftir, at vit ikki aftur hesuferð koma at bera byrðarnar av eini ósemju, sum vit so at siga ikki eru partur av.

Alt ov ofta hava vit lagt rygg til verkføll, sum ikki merkjast nevnivert aðrastaðni, og lokalsamfelag okkara býður ikki bøtur, nú henda støða enn einaferð rakar okkum.

Serliga órættvíst kennist tað, nú stríðið stendur millum tað almenna og tey alment løntu, sum so at siga ikki finnast her um okkara leiðir.

Við størstu virðing fyri rættindunum á arbeiðsmarknaðinum at samráðast, fari eg tí at heita á tykkum um at lata Smyril sigla sum vanligt, tí sambandið úteftir er ein mannarættur, og avbyrging er ágangur móti persónliga frælsinum.

Á jøvnum føti við onnur, sum hava frítt at fara, eru vit í Suðuroynni fús at bera okkara part av teimum ósemjum, ið tá taka seg upp.

# So vóru Suðringar og Sandingar aftur straffaðir

**Johan Dahl**
*løgtingsmaður*



Hendan áhaldandi isolering av hesum báðum økjum, tá verkfall er, ber snøgt sagt ikki til longur.

Seinast Smyril kom til landið varð eisini verkfall, og nú Guð hjálpi tú mær skulu vit aftur revsast her suðuri við einum nýggjum verkfalli - nú hesin nýggi Smyril kemur.

At hesi bæði øki verða jarðløgd, hvørja fer verkfall, er skal og má steðgast NÚ! Kanska hevði rættast verið at semingssamráðingarnar vóru í Suðri, tí so kundu samráðingarpartarnir lýst verkfallið soleiðis sum gjørt var í gjár kl. 14 - og í samhuga verið verandi her suðuri saman við okkum gíslum.

Tað er ikki meira enn rímiligt at vit ikki verða verri stillað enn restin av landinum og kunnu flyta okkum aftur og fram millum meginøkið og Suðuroynna og Sandoynna.

Um ikki avvarðandi stovnur og fakfeløg saman kunnu finna eina skilagóðan loysn, so ikki Suðuroyingar og Sandoyingar verða raktir meinast hvørja fer verkfall er, so eigur lóggevandi mynduleikin at finna eina sømuliga loysn á hesum fyri allar suðuroyingar, sandoyingar og vinnunar í báðum oyggjunum so álvarsligu støðu, sum siglingin og flutningur til og úr økjunum er og tryggja, at økini ikki verða isoleraði hvørja fer verkfall er.

Fólkini í hesum økjunum krevja at verða hoyrd og vird av landsins fakfeløgum og mynduleikum og ikki hildin sum gíslar hvørja fer ósemja er!!

Vit krevja sama rætt og somu møguleikar sum restin av landinum, hvat viðvíkur flutningi av fólki og farmi til og frá meginøkinum.

Neyðugt verður at lóggeva soleiðis, at ferjurnar ikki kunnu rakast av verkfalli, tí hetta er lívsæðr okkara til meginlandið.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.